# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og gudstænasta, Aase B. Olsen.
Frá leygardegi 13. juli og til og við 10. august verður farið í kirkju kl. 11.

**Ebenezer**
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskt møti, kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Heimasíðan: www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30: Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Orðsins tænasta við kommunión í Mariukirkjuni.
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Orðsins tæansta við kommunión í Kerit.

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Ytrimissiónsmøti v/ Maureen og Christopher Clarke.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Levi Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti. Innsavnan.

**Heimamissiónin**
Heimamissiónin hevur útimøti fríggjakvøldið kl. 20 í Skopun.
Leygardagin kl. 16 útimøti í Skúvoy og kl. 20 møti í missiónshúsinum í Skúvoy.
Sunnudagin kl. 15 útimøti í Skálavík og kl. 17 útimøti á Sandi.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið 3. aug. kl. 21.00: Opið hús við Mirjam og Mariu.
Sunnukvøldið 4. aug. kl. 19.00: Møti v/ Paula Høj.
Bønarmøti hvørt mánakvøld frá kl. 20.00–21.00.
Tú ert vælkomin í Kelduna: www.keldan.fo

**Frá Lívsins Orð**
Morgunmøti verður kl. 10.30, Poli Jacobsen talar. Kl. 17.00 verður evangeliskt møti, har Fríðtór Debes talar.
Bønarmøti verður mikukvøldið kl. 20.00.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 18.00: Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskur fundur, kl. 21.00: Útifundur, um viðrar.
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vági**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Útimøti í Sumba um viðrar.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Karl og Elidu.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið. Innsavnan til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 4. august verður gongutúrur úr Oyndarfirði til Elduvíkar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.00. Túrurin er lættur og gingið verður í uml. 2 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við.

**Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR**
Mikukvøldið 7. august verður gingið niðan til Kongavarðarnar. Farið verður av Krossinum kl. 19.00. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við.

**Eldrafelagið Nón: ÚTFERÐ**
Vit fara útferð til Elduvíkar sunnudagin 25. aug. Farið verður frá Sjómansheiminum í Runavík kl. 11.00.
Eisini gera vit ein túr til Sands 30.8. til 1.9. Nærri boð ring 447718 ella 447242 áðrenn týsdagin 20.8.
*Eldrafelagið Nón*

**Eysturoyar Gongufelag**
Um viðrar verður farið árliga túrin niðan á Fuglafjarðarskarð sunnudagin 4. august. Vit møtast við Kunningarstovuna/Bókasavnið í Fuglafirði kl. 14.00. "Fjallarøðan" verður hildin av Randi Vang og felagssangur verður eisini á skránni. Tilmelding ikki neyðug. Meir fæst at vita á kunningarstovunum í oynni.
*Eysturoyar Gongufelag og Fuglafjarðar Fornminnisfelag*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 17. august hava vit opið frá kl. 13-17.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða í kvøld kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo
**Skrivstovan er stongd til 7. august 2002.**

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Opið verður aftur týsdagin 20. august 2002.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

## BRÚDLEYP

Í dag, 2. august, giftast í Antwerpen í Belgia Frida S. Johannessen úr Tórshavn og Michel Dupont úr Antwerpen. Brúdleypsadressa: De Jachthoorn, Doomstraat 11, 2550 Kontich, Belgium.

Leygardagin 3. august giftast í Býráðssalinum í Tórshavn Heidi Skoubo og Mikkjal Godtfred. Veitslan verður í Pálsstovu fyri innbodnum.

Leygardagin 3. august kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Ann-Lisa Nielsen, Hoyvík, og Hans Arne Niclasen, sonur Solveig og Ingvard Niclasen, Idestrup. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 3. august klokkan 14.00 giftast í prestagarðinum í Miðvági Elin Hálvdansdóttir Gudmundsen og Jan Erik Simonsen úr Sandavági. Veitslan verður fyri innbodnum.

Leygardagin 3. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Marjun Wilhelm, Tórshavn, og Ólavur Brimnes, Vestmanna. Brúdleypið verður hildið á Læraraskúlanum fyri indbodnum kl.18.00.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Rødding kirkju Ingun Ellefsen úr Miðvági og Martin Andersen úr Rødding. Brúdleypadr.: Rødding Forsamlingshus, Borgergade, 7863 Spødstrup.

Sunnudagin 4. august kl. 10.00 giftast í Býráðssalinum í Tórshavn Bjørg Hovland, Tórshavn, og Annfinnur Hjelm, Vágur. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 12.30.

Leygardagin 10. august kl. 15 giftast í býráðshøllini í Klaksvík Hansy Thomsen Klaksvík, og Martin Tuohy Esbjerg. Um veðrið verður til vildar, verður vígslan úti í Grøv. Tað verður receptión eftir vígsluna. Brúdleypið verður hildið í Betesda fyri innbodnum.

Leygardagin 17. august kl. 15.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Simona Blábjørg, Fuglafjørður, og Jóannes Poulsen, Lamba. Veitsla verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at hátíðarhalda dagin saman við brúðarparinum, verða biðin um at siga frá áðrenn 3. august á tlf. 444302, 447372 ella 251010.

Leygardagin 7. september kl. 16.00 giftast í Norðskála kirkju Jonna Dahl og Heðin Debes, Oyri, Veitslan verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 422734, 422234 ella 422220 í seinasta lagi 21. august.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 13. august hava Mervin og Una Thomsen, Hvalba, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Roynhøllini leygardagin 17. august kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at ringja tlf. 375333, 210333 ella 375142 í seinasta lagi 5. august.

## 80 ÁR

Fríggjadagin verður Hertha Magnussen á Nesi 80 ár. Dagin heldur hon saman við sínum næstu.



# FILMSTEIGURIN

## Burturhugur – Observaciones de Cuba

Filmurin fer fram á hitalandsoynni mitt í Karibiska havinum. Vit fylgja teimum fýra, fiskimanninum Manuel, sjúkrasystrini Raceldu, tónleikaranum Lazarus og yrkjaranum Luis í gerandisdegi teirra. Filmurin miðar ímóti at koma fram á sereyðkenni í hesum samfelag, sum liggur so fjart frá øllum, sum tykist okkum íheimligt, men sum hóast tað er ætlaður at geva aftursvar upp á fyrsta part av Burturhugur - úr Hattarvík. Á sama hátt sum í undanfarna filminum verður aftur hesaferð lagdur dentur á almenn menniskjalig virði. Í gerandismyndum finnur filmurin fram til ein sannleika í tilveru og tíð, sum verða flættað saman til eina heild. Realisma út í odd og egg, sum flýtur inn í poesi. Eins og á útoyggj í Føroyum hava aftur her verið ríkir møguleikar at nýta umhvørvið í lýsingunum av persónunum og í frásøgugongdini sum heild: Breiðir sukurakrar, pálmaskrýddar strendur, elligamlir hugnaligir býarpartar, akfør frá fyrra parti av farnu øld og allastaðni eisini tekin um kollveltingina. Myndin, ið her verður sett fram, líkist lítið teirri romantisku ofta kollveltingarsomu, ið tiðum er at síggja, tá ið ræður um tilfar av Kuba. Filmurin er leitandi, men hann letur tað upp í hendurnar á áskoðaranum at finna svarini og koma fram til niðurstøður.

Leikstjóri er Teitur Árnason.





## Úlvagentan Tinka

Søgan fer fram í 1850. Tá mamman liggur á deyðastrá, fær 9-ára gamla gentan, Tinke, eitt hálsband, sum hevur verið ogn hjá ríku móðurættini, sum Tinke nú skal seta seg í samband við. Men hon er um at doyggja í hungri, einsamøll sum hon er í oyðimørkini. Hon hittir smaladrongin, Larus, sum tekur hana við sær heim á garðin, har hann arbeiðir. Bóndin ætlar at senda hana í fátækrahúsið at verða, men kona hansara vil hava hana búgvandi og vil uppala hana sum tað dóttrina, hon ongantíð fekk. Men Tinke er sum eitt villini djór, og tað er ikki lætt at læra hana fólkaskikk. Hon hevur ætlanir um at finna sína ríku ommu og abba, men hevur av óskeytni mist hálsbandið.





Fríggjadagin 02.08. kl. $19^{00}$ Fríggjadagin 02.08. kl. $21^{15}$
Leygardagin 03.08. kl. $19^{00}$ Leygardagin 03.08. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 04.08. kl. $19^{30}$ Sunnudagin 04.08. kl. $21^{45}$




Fríggjadagin 02.08. kl. $20^{30}$ Fríggjadagin 02.08. kl. $23^{00}$
Leygardagin 03.08. kl. $20^{30}$ Leygardagin 03.08. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 04.08. kl. $20^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P




Fríggjadagin 02.08. kl. $23^{30}$ Leygardagin 03.08. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 04.08. kl. $22^{15}$




Leygardagin 03.08. kl. $16^{30}$ Sunnudagin 04.08. kl. $16^{30}$

**Burturhugur**
**Observaciones de Cuba**



Leygardagin 03.08. kl. $17^{00}$ Sunnudagin 04.08. kl. $17^{00}$